


## INNKLUDERANDI SIRKUS

**Frítíðarskúlin er eitt interessant stað, sum á mangan hátt er ein bindiliður ímillum tað, at vera "úti" og tað, at vera "heima". Tað trygga og fjálga, umsorganin, og so tað fremmanda og spennandi, sum dregur og mennir okkum.**

Í frítíðarskúlanum er altíð rokan í fjøruni, og eingin dagur er líka, hvørki fyri okkum starvsfólk ella fyri børnini – júst sum føroyska veðurlagið, sum kitlar og argar okkum við skiftandi regni, vindi, mjørka og sólglottum – tann íborna skapandi megin og dagsins avbjóðingar. Blekkspruttukendi dagurin í frítíðarskúlanum er samstundis býttur upp í tvey av millummálanum, eitt friðskjól, har ið vit savnast um tað heimliga og borðsiðirnar... og savna tankarnar, áðrenn børnini tuska út aftur at spæla, byggja, tekna, binda, grava, ja tað er ov mikið at finna øll tey sagnorð fram, sum kunnu lýsa alt tað, sum børnini her takast við. Picasso skal hava sagt, "Í hvørjum barni býr eitt listafólk. Tað trupla er at duga at verða verandi listafólk sum vaksin", og hesi børn fáa sovandi listafólkini í okkum vaksnu at vakna, og í vár vaknaðu vit øll her á Frítíðarskúlanum á Argjahamri til eina listaliga verkætlan, sum seinni fekk navnið "SIRKUS ARGANI".

Sirkusverkætlanin fekk eitt heilt skalvalop av kreativiteti á glið, og eg má ásanna, at eg hevði sjálvur ongantíð yvirblikkið yvir alt, sum hendi innan fyri Sirkusi í Frítíðarskúlanum á Argjahamri. Juanita og Winnie vóru sirkusdirektørar, sum býttu út leiklutir til børnini, sum antin valdu at blíva gandakallar, ella apur, klovnar, kempur, dansarar, ella berarar, ein praktiskur leiklutur, sum eisini skal til fyri at halda sirkusteltinum uppi. Øll kundu gera sítt til at vera við, og í eini tilgongd, sum er eins umráðandi og úrslitið – um ikki týdningarmiklari – lærdu børnini og vit vaksnu at innliva okkum, at samstarva og at venda skuffilsum til hugflog og jaliga menning. Mitt í allari hesari kensluligu jungluni, stórarbeiddu Eydna og Sunneva í tí stilla við at seyma tey óteljandi pløggini, sum tær sniðgóvu í samráð við børnini, og ítrívsrúmið og smíðrúmið sóu nú dagliga sminkaði børn og sirkuspallar koma inn at venda. “Hvor der er hjerterum, er der også husrum”, og hetta dugir Maria sum fáur, tá ið hon stákast í køkinum, og fær okkum at merkja kærleikan ígjøgnum havragrýnsbollarnar, tí ”Uden mad og drikke, duer helten ikke”.

So við eitt tvær vikur áðrenn framførsluna, bleyv eg sjálvur skumpaður inn í streymin, skuldi avloysa Eyðbjart í at venja nøkur børn í “sterka manni”, “búktalaradukkuleiki” og “jonglering”. Hetta var endaspurturin fram til stóru framførsluna í Miðrókini (auluni) í Skúlanum á Argjahamri, so her var tað neyðuga stressið í gongd, og øll vóru spent og nervøs, um tey nú høvdu vant nóg nógv ella dugdu nóg væl; ímeðan skundaðu Fríði og Nikkil sær at fínmála kulissurnar úti í afturvendandi góðveðrinum uttanfyri. Og tíðin gongur altíð skjótari, enn ein vil, so knappliga upprann hin pausuleysi dagurin, tá ið børnini lótu síðstu kalendaralúkuna upp við eini litfagrari tekning av einum sirkusteltið innaní. Let the game begin !

Brátt fylti áskoðarafjøldin allar trætrappurnar, ímeðan eg rann aftur og fram fyri at orðna snøklar í tøkum sekundi við tónleiki, venjing og øðrum, sum eg var sigldur afturúr við. Mika gekk so fittur í eini snotuligari apudrakt og býtti út poppkorn ímillum fólkini. Popp popp popppopppopp !!!, læt í mikroovninum í starvsfólkakøkinum, ímeðan livandi grýtur runnu út og inn til tey lekkursultnu foreldrini í Sirkus Argani, sum hevði sín heilt egna poppkornstand. Genturnar Randi og Joan settu Sirkusið í gongd, og síðan komu okkara talentfullu børn á pall sum einstaklingar og sum bólkar og framførdu alskyns kynstur, og eg má siga, at eg var ikki sørt stoltur, sum eg stóð og filmaði hesi vøkru menniskjabørn geva tað besta, sum tey høvdu. Øll vóru við, og eingin var, sum ikki kundi gera mun onkustaðni. Mong inntrykk á sjónarhindina : Smittandi smílið hjá klovninum Guðrin og kenslusmurda blundaríið hjá wannabe-boybandinum ”All out”.

Mítt kameraarbeiði var alt annað enn støðugt, tá ið eg brádliga sjálvur varð biðin um at koma á senuna fyri at spæla “sterki maður”, sum ein drongur annars skuldi spæla. Eg sprakk burtur frá kameranum, blakaði ryggsekkin av mær, sum eg sneiðaði mær aftur um trapputribununa, har ið mín gula t-shirt fleyg upp í loft, og so út ígjøgnum gardinurnar at gera meg til grin eina løtu. Gera okkum vaksnu til grin, tað hava vit væl brúk fyri innímillum, ikki so ? Hetta var eisini boðskapurin hjá dukkuni í dukkuleikinum hjá Ronju og Hallu, har ið barnaverðin og vaksnamannaverðin stoyta saman, men enda við at finna hvønn annan. Og í tí gráa gerandisdegnum koma glottar á leiðini, hesar løtur av befríilsi, tá ið vit gerast eins og børn aftur, og liva út okkara innaru kunstnarar, inspireraði av tí og teimum, sum umgeva okkum í núinum. Sirkus Argani, ella Frítíðarskúlin á Argjahamri í stuttum.









Myndir : Eydna Dalsgaard

Grein : Napoleon Smith

www.argjahamri.fo